SEPTEMBER 2024

# SJÓMAQ-FRÁGREIÐINGIN

BROT ÚR FRAGREIÐING UM KUNNLEIKAN OG HUGBURÐIN HJÁ UNGDÓMIN Í RÍKISFELAGSSKAPINUM.



# INNIHALD

Formæli ....3
Kunnleiki ....4
Áhugi ....8
Áskoðan ....9
Fordómar og keðiligar søgur ....10
Felagskensla ....12
Hugburður ....14
Uppskot til eina loysn frá teimum ungu ....17
Soleiðis hava vit arbeitt ....18
Um Sjómaq ....19

**Um frágreiðingina:**
Sjómaq-frágreiðingin - Eitt brot úr frágreiðing um kunnleikan og hugburðin hjá ungdómin í ríkisfelagsskapinum. September 2024

***Øll frágreiðingin er at finna á heimasíðuni hjá Sjómaq ella umvegis QR-kotuna her.***

Útgivið hevur DUF – Dansk Ungdoms Fællesråd og er partur av Sjómaq-verkætlanini.

Útgávan kann endurgevast frítt við upplýstari keldu.

**Útgevarar:**
Jonas Roelsgaard,
verkætlanarleiðari Sjómaq

Sofie Sørensen,
lesadi Sjómaq

Annika Jespersdóttir,
týdd til føroyskt

**Samstarvsfelagi:** Epinion

**Grafiskur tilevnari:** Grafisk Afdeling ApS

**Prent:** Lasertryk

DUF er ein paraply- og áhugafelagsskapur fyri 78 samfelagsvirkandii barna- og ungdómsfelagsskapir. DUF virka til at frama fyri luttøkuna hjá teimum ungu í felagsarbeiði og fólkaræði.

# FORMÆLI

Grundarlagið til eitt gott og áhaldandi samstarv millum Føroyar, Grønland og Danmark, veldst um, at fólkini í teimum trimum londunum kenna hvønn annan. Tíverri er ein ábending um, at vitanin tvørtur um londini er avmarkað – í mestan mun í Danmark.

Tí fóru DUF – Dansk Ungdóms Fællesråd, MFS, AFS (Føroyar og Grønland) og SOLARK í holt við verkætlanina Sjómaq. Endamálið við verkætlanini er at styrkja sambandið og kunnleikan millum ung í ríkisfelagsskapinum.

Higartil hevur útgangsstøðið í verkætlanini verið grundað á nakrar áskoðanir. T.d. at ung í Danmark vita minst um ríkisfelagsskapin og hini bæði londini. At ung í Føroyum og Grønlandi ikki Vita nógv um hvønn annan, og at har ikki er ein sterk felagskensla millum ung í ríkinum.

Hetta eru áskoðanir, sum fólkini aftanfyri verkætlanini ynskja at varpa ljós á. Er ein felagskensla millum ung í ríkisfelagsskapinum? Hvussu nógv vita tey um hvønn annan? Hvat heldur ungdómurin um framtíðina hjá ríkisfelagsskapinum?

Okkum kunnugt, er hetta fyrstu ferð, ein frágreiðing verður gjørd um sambandið millum ungdómin í ríkisfelagsskapinum við luttøku frá ungum úr øllum trimum londunum. Vit hava lagt nógva orku í arbeiðið og eru errin av at hava megnað at savna bæði kvantitativar og kvalitativar upplýsingar frá øllum trimum londunum. Hetta hevði ongantíð verið ein møguleiki uttan góða samstarvið í samstarvshøpinum hjá Sjómaq.

Frágreiðingin er grundað á trimum viðtalukanningum, har ung úr øllum ríkinum luttóku. Harumframt er gjørd ein spurnarblaðakanning millum 1014 donsk, 318 grønlendsk og 222 føroysk ung í aldursbólkinum frá 18-28 ár. Hetta er eitt brot, sum er grundað á høvuðsevnini í fullu frágreiðingini, ið er at finna á heimasíðuni hjá DUF og Sjómaq.

Við støði í frágreiðingini ynskja vit at leggja størri dent á vantandi vitanina tvørturum londini. Vit vóna, at frágreiðingin kann taka spurningin, hvussu vit kunnu tryggja eitt javnsett samstarv og ein størri kunnleika millum londini, til umrøðu.

*Góðan lestrarhug!*

**CHRISTINE RAVN LUND** / DUF – Dansk Ungdoms Fællesråd
**ANNIKA JESPERSDÓTTIR** / MFS
**KATRINA VANG** / AFS FO



# KUNNLEIKI

***Í fyrsta parti kanna vit nærri, í hvønn mun tey ungu halda seg kenna hvønn annan.***

**Ung hava ein skerdan kunnleika um ríkisfelagsskapin og hini bæði londini**
Ein av høvuðsniðurstøðunum í frágreiðingini er, at ung í ríkinum hava ein yvirfladiskan kunnleika um ríkisfelagsskapin, sum eina ríkisrættarliga skipan, og mangla neyvari vitan um uppruna, virki og nútíðar týdning tess.

Í teimum trimum londunum knýta tey ungu ríkisfelagsskapin saman við søgu og politiskum samstarvi. Her hugsa tey flestu um Konghúsið og Fólkatingið, har ið bæði Føroyar og Grønland hava tveir fólkatingslimir at umboða seg. Summi umrøða eisini árligu nýggjárstaluna hjá regentinum.

Føroysk og grønlendsk ung hava eina størri vitan um tað danska samfelagið, enn hvat tey donsku ungu vita um hini bæði londini. Til viðtalusamrøðurnar meta donsk ung, at grønlendsk ung hava eina størri vitan um danska søgu og mentan enn øvugt. Føroysk ung meta, at tey vita eins og lítið um Grønland, sum grønlendsk ung vita um Føroyar.

Spurnarblaðakanningin vísir á, at tey ungu í Danmark vita meira um Grønland enn um Føroyar.



15 %

ung úr Danmark siga, at tey einki vita um Føroyar.

**Hvat halda tey ungu um undirvísingina í skúlanum?**
Hóast uml. 7 av 10 donskum ungum siga, at tey í minsta lagi eina ferð hava lært um ríksifelagsskapin í skúlanum (71 %), siga 39 %, at tey einans hava lært um hetta eina ferð í samlaðu skúlatíðini. Næstan 30 % siga, at tey ongantíð hava lært um ríkisfelagsskapin ella, at tey eru í iva, um tey nakrantíð hava lært um hann í skúlanum. Hetta sær øðrvísi út í Føroyum, har 80 % siga, at tey hava lært um ríkisfelagsskapin í skúlanum (53 % meira enn eina ferð). Í Grønlandi eru tað 70 %, sum hava lært um ríkisfelagsskapin meira enn eina ferð.

Vit hava i kanningini spurt tey ungu, í hvørjum av hesum fýra evnunum tey hava lært um ríkisfelagsskapin: Søga, landafrøði, samfelag/mentan og leiklutin í ríkisfelagsskapinum. Millum donsk ung hevur ein meiriluti lært um grønlendska landafrøði (68 %), meðan tey fæstu hava lært um søguna (39 %). Viðvíkjandi Føroyar" kanska. Annars sær tað út sum, at hetta eru tey føroysku ungu eru tølini heldur øðrvísi. Her hava tey flestu lært um føroyska landafrøði (38 %), og einans 19 % hava lært um søguna.



56 %

ung í Danmark siga, at tey einans hava lært um ríkisfelagsskapin eina ferð ella ongantíð í skúlanum

Í Føroyum siga tey ungu, at tey hava lært um Danmark í øllum fýra evnunum (yvir 80 %). Tølini úr Føroyum um Grønland eru lægri. Tey hava lært mest um Grønland í landafrøði (60 %). Hetta sæst aftur í Grønlandi, har lærdómurin er í røðini 24-30 %  í øllum fýra evnunum.

Eins og í Føroyum eru tølini í Grønlandi eisini høg í øllum fýra evnunum. Harvið er greitt, at vitanin um Danmark í Grønlandi og Føroyum er munandi størri enn øvugt, og at skúlin hevur ein ávísan leiklut í hesum.

# DONSK UNG:

Hevur tú í tina skúlagongd lært um grønlendska/føroyska




# FØROYSK UNG:

Hevur tú í tina skúlagongd lært um grønlendska/danska




# GRØNLENDSK UNG:

Hevur tú í tina skúlagongd lært um føroyska/danska



**Vitanin hjá teimum ungu í Danmark og Grølandi er ógvuliga avmarkað**
Kunnleikin hjá bæði donskum og grønlendskum ungum um Føroyar er avmarkað. Í viðtalukanningini nevna tey náttúru, fiskivinnu og seyðahald, tá tey verða spurd um, hvat tey vita um Føroyar.

Summir danir halda, at føroyingar eru konservativir, og at størri fokus er á reproduktión og barnloysi, orsakað av hóvligu støddini á fólkatalinum.

Bæði donsk og grønlendsk ung siga, at teirra almenna vitan um Føroyar og føroyskan ungdóm er avmarkað. Nógv siga seg ikki minnast, at tey hava lært um Føroyar í skúlanum. Spurnarkanningin styðjar uppundir hetta, har lutfallið av donskum ungum, sum hava lært um Føroyar í skúlanum, er uml. 20 % lægri samanborið við Grønland. Her siga einans 19 %, at tey hava lært um føroyska søgu. Hetta sæst aftur millum grønlendsk ung. Her hava 30 % lært um landafrøðina í Føroyum, 29 % siga seg hava lært um føroyska mentan og samfelag, umframt teirra leiklut í ríkisfelagsskapinum. Einans 24 % hava lært um føroyska søgu.

Yvirhøvur vísa tølini, at Føroyar hava ein lítlan leiklut í donsku og grønlendsku skúlaundirvísingini.

**Hin grundleggjandi vitanin**
Í spurnarblaðakanningini verða luttakararnir spurdir, hvaðani teirra grundleggjandi vitan um hini bæði londini kemur frá. Her sigur ein minniluti av donskum ungum, at teirra vitan er grundað á faktuellar upplýsingar frá álítandi keldum (ávikavist 22 % og 14 % fyri Føroyar og Grønland). Tey flestu siga, at hon er grundað á, hvat tey hava hoyrt ávikavist (36 % og 39 % í Grønlandi og Føroyum), meðan nærum ein triðingur (Grønland) og en fjórðingur (Føroyar) siga, at teirra vitan er ein samanseting av báðum. Heili 15 % siga, at tey einki vita um Føroyar.






## UNG Í DANMARK
**Hvaðani kemur tín vitan um Grønland og Føroyar?**

Meirilutin av ungun dønum siga, at teirra vitan er grundað á tí, sum tey hava hoyrt (36 % um Grønland og 39 % Føroyar). Hinvegin sigur ein triðingur (Grønland) og ein fjórðingur (Føroyum), at teirra vitan er grundað á bæði faktuellum upplýsingum, og tí sum tey hava hoyrt.

## UNG Í FØROYUM
**Hvaðani kemur tín vitan um Grønland og Danmark?**

36 % føroysk ung siga, at teirra vitan um Grønland stavar frá tí, tey hava hoyrt, meðan 12 % siga, at hon er frá álítandi keldum (41 % siga, at tað er ein blanding). Vitanin um Danmark kemur frá álítandi keldum (31 %), 13 % er grundað á tí, sum tey hava hoyrt og 54 % er ein samanseting av báðum. Einans 5 % hava ongan kunnleika um Grønland, meðan 0 % siga, at tey einki vita um Danmark.

## UNG Í GRØNLANDI
**Hvaðani kemur tín vitan um Føroyar og Danmark?**

Í Grønlandi siga 28 %, at teirra vitan um Danmark stavar frá álítandi keldum, og 24% siga, at hon kemur frá tí, tey hava hoyrt (34 % siga ein samanseting av báðum). Einans 9 % siga, at teirra vitan um Føroyar stavar frá álítandi keldum, meðan heili 32 % siga, at tey einki vita um Føroyar. 19 % siga, at teirra vitan stavar frá tí, tey hava hoyrt, og 19 % siga, at tað er ein samanseting av báðum.


Grønland
Føroyar
22 %
14 %
36 %
39 %
31 %
25 %
6 %
15 %
5 %
7 %
Mín vitan grundað á faktuellum upplýsingum frá álítandi keldum
Mín vitan er grundað á tí, sum eg havi hoyrt
Mín vitan er grundað á bæði faktuellum upplýsingum, og tí sum eg havi hoyrt
Eg veit einki um landið
Veit ikki


Grønland
Danmark
12 %
31 %
36 %
13 %
41 %
54 %
5 %
0 %
5 %
3 %
Mín vitan grundað á faktuellum upplýsingum frá álítandi keldum
Mín vitan er grundað á tí, sum eg havi hoyrt
Mín vitan er grundað á bæði faktuellum upplýsingum, og tí sum eg havi hoyrt
Eg veit einki um landið
Veit ikki


Føroyar
Danmark
9 %
28 %
19 %
24 %
19 %
34 %
32 %
7 %
20 %
7 %
Mín vitan grundað á faktuellum upplýsingum frá álítandi keldum
Mín vitan er grundað á tí, sum eg havi hoyrt
Mín vitan er grundað á bæði faktuellum upplýsingum, og tí sum eg havi hoyrt
Eg veit einki um landið
Veit ikki

# ÁHUGI

***Í partinum “kunnleiki” hava vit sæð, at hóast vitanin um Danmark er góð, so er vitanin bæði frá danskari síðu og millum Føroyar og Grønland, avmarkað. Í hesum partinum kanna vit nærri, um áhugi er fyri ríkisfelagsskapinum og hinum báðum londunum.***

**Meginparturin heldur, at tað er umráðandi at kenna ríkisfelagsskapin**
Yvir helvtin av donskum ungum halda, at tað í “stóran” (34 %) ella “ógvuliga stóran” mun (18 %), er umráðandi at hava ein kunnleika um ríkisfelagsskapin og Føroyar og Grønland. Leggur tú lutfallið, sum heldur, at tað hevur týdning “í ávísan mun” (31 %), afturat, so heldur ein stórur meiriliti á 83 %, at kunnleiki hevur týdning á onkrum ella á høgum støði.

Líknandi tøl kennast aftur frá teimum føroysku og grønlendsku ungu. Her siga 54 % grønlendsk ung, at tað í “stóran” ella “ógvuliga stóran Millumrúm mun er týdningarmikið at kenna ríkisfelagsskapin. Verður “í ein ávísan mun” lagt afturat, halda heili 86 %, at tað er týdningarmikið. 65 % føroysk ung halda, at tað í “stóran” ella “ógvuliga stóran” mun er umráðandi at kenna ríkisfelagsskapin. 22 % halda, at tað í “ein ávísan mun” er umráðandi.

Tað er sostatt ein lutfalsliga lítil partur av ungum, sum ikki halda tað er týdningarmikið at kenna ríkisfelagsskapin. Har er tí ein størri áhugi millum donsk ung fyri meira vitan um ríkisfelagsskapin og hini bæði londini.

**Fyri at nema sær meira vitan, ynskja tey ungu at vitja hini bæði londini**
Ungdómurin heldur, at tað hevði økt teirra vitan, um tey sloppu á námsferð at vitja hini bæði londini. Nærum 3 av 4 ung í Danmark siga, at tey ynskja at vitja Grønland fyri fyrstu ella aðru ferð, og 67 % vilja vitja Føroyar fyri fyrstu ella aðru ferð. Tað er einans ein lítil brotpartur, sum áður hava vitjað londini (7 % og 5 % í Grønlandi og Føroyum).

Meirilutin av ungum í Føroyum og Grønlandi hava áður vitjað Danmark. Í Føroyum ynskja 87 % ung at vitja Grønland (74 % fyri fyrstu ferð) og Danmark (77 % enn einaferð). 85 % grønlendsk ung ynskja at vitja Danmark (68 % aftur) og 75 % Føroyar (65 % fyri fyrstu ferð).

**“Í síðstu atløgu eru vit ungu ikki so ymisk. Vit halda nógv um hvønn annan, sum vit ikki kunnu staðfesta ella avsanna, um vit ikki møta og læra frá hvørjum øðrum”**

Danskur maður, 26 ár

**“Tað hevði verið gott, um vit lærdu meira, áðrenn vit fyltu 18 ár, tí vit kunnu atkvøða, tá vit fylla 18. Hendan kunnleikan kundu vit fingið gjøgnum fjølmiðlarnar, soleiðis at tey ungu hava møguleika fyri at fylgja við og vita, hvat tosað verður um”**

Føroysk kvinna, 24 ár



# ÁSKOÐAN

***Í hesum partinum kanna vit nærri, hvørja áskoðan tey ungu hava um hvønn annan, og um har er ein felagskensla millum tey ungu.***

**Áskoðan**
Fatanin hjá ungum í Danmark um Føroyar og Grønland er øðrvísi enn tað, sum kennist frá almenninginum. Hon er nevniliga munandi jaligari. Samlað halda 26 %, at almenna fatanin av Grønland í Danmark er sera ella yvirhøvur jalig. Hinvegin heldur ein triðingur (32 %), at fatanin er hvørki jalig ella neilig, meðan 31 % halda, hon er yvirhøvur ella sera neilig. Almenna fatanin av Føroyar millum ung í Danmark er sera ella yvirhøvur jalig (44 %). Einans 7 % meta, at hon er yvirhøvur ella sera neilig.

Sí grafikkin á s. 11

Næstan 4 av 10 halda, at Grønland og Føroyar hvørki verða neiliga ella jaliga førd fram í fjølmiðlunum. Har er kortini ein stórur munur á, hvussu donsk ung halda, at Føroyar og Grønland verða myndaði. Ávikavist 23 % og 40 % halda, at Grønland og Føroyar verða lýst sera ella yvirhøvur jaliga, meðan 25 % og 5 % halda, at londini verða lýst yvirhøvur ella sera neiliga. Kortini, halda donsk ung, at teirra egna fatan er meira jalig, í mun til hvat hin almenna fatanin er. 48 % og 54 % hava eina jaliga fatan av Føroyar og Grønland.

Føroysk ung meta, at hin almenna fatanin av Danmark er jalig (64 %), meðan hon er 52 % fyri Grønland. Tey ungu meta, at føroyskir fjølmiðlar lýsa Danmark meira jaligt enn Grønland (ávikavist 57 % og 15 %). Fatanin hjá føroyskum ungum er meira neilig, enn hvat hon er í Danmark. 58 % hava eina jaliga fatan av Danmark, meðan einans 7 % hava eina neiliga. Einans 16 % hava eina jaliga fatan av Grønland, meðan 47 % hava eina neiliga.



Í Grønlandi er heldur øðrsvísi. Næstan helvtin siga, at tey ikki vita, hvat teirra egna ella áskoðanin hjá almenninginum er. Hetta samsvarar væl við, at 32 % hava sagt, at tey onga vitan hava um Føroyar (sbrt. partin um kunnleika). Kortini er áskoðanin um Føroyar ógvuliga jalig. 38 % siga, at almenna fatanin um Føroyar er jalig, 22 % halda, at fjølmiðlarnir lýsa Føroyar jaliga og 22 % hava eina samlaða jaliga fatan av landinum.

Um Danmark siga 37 %, at almenna fatanin av Danmark er jalig, 21 % halda, at grønlendskir fjølmiðlar lýsa Danmark jaliga og einans 15 % hava sjálvi eina jaliga fatan av Danmark. Tað merkir (hitt er danisma), at heili 44 % hava hvørki eina jaliga ella neiliga fatan av Danmark, og 20 % hava eina neiliga.



# FORDÓMAR OG KEÐILIGAR SØGUR

**Uppfatanin hjá teimum ungu av hinum londunum**
Til viðtalukanningini vórðu tey ungu spurd, hvussu teirra og hin almenna fatanin av hinum báðum londunum er litað av fordómum. Hóast tey flestu ungu royna at hyggja burtur frá stereotypar fatanir, ásanna tey, at fordómarnir framvegis eru til staðar orsakað av vantandi vitan.

**Kunnleikin hjá føroyskum og donskum ungum um Grønland er merkt av neiligum frásagnum**
Í viðtalukanningini vórðu tey ungu úr Danmark og Føroyum biðin um at lýsa Grønland. Her nevndu tey náttúruna, djóarlívið og geopolitisku staðsetingina. Hareftir vórðu tær sosialu og mentanarligu umstøðurnar nevdnar, sum í størri mun eru eyðkendar av søgum um ótrivnað, insest, alkoholismu, fíggjaligar avbjóðingar, fáar arbeiðs- og útbúgvingarmøguleikar og eina hóttan á mentanararvina.

**Har eru eisini fordómar og stereotypur um føroyingar og danir**
Tá grønlendsku og donsku luttakararnir í viðtalukanningini vórðu spurdir um teirra vitan um Føroyar, løgdu tey dent á náttúru, fiskivinnu og seyðahald. Summi danir nevndu eisini hvalaveiðu, at føroyingar eru meira konservativir í mun til danir og at størri fokus er á reproduktión og barnloysi, orsakað av støddini á fólkatalinum. Føroyingar og grønlendingar lýsa danir sum harmæltir, dominerandi, niðursetandi og óvitandi.

**Uppfatanin hjá teimum ungu av hinum londunum**
Ein størri partur av teimum ungu í Grønlandi halda, at almenna fatanin av Danmark er jalig, ella at hon er hvørgan ja- ella neilig. Áleið tað sama verður sagt um Føroyar, hóast næstan helvtin siga seg ikki vita. 44 % siga, at teirra almenna fatan av Danmark er hvørki jalig ella neilig, meðan 20 % hava eina neiliga fatan – einans 15 % siga, at tey hava eina jaliga fatan av Danmark.

**"Eg kenni væl Danmark, tí vit fara altíð hagar at halda feriu. Tað haldi eg er gott, men eisini keðiligt, tí summi lítilsmeta okkum. Tey siga, at vit eru alkoholikarir"**

Grønlendsk kvinna, 24 ár







N=1.014
DONSK UNG
Hvat heldur tú almanna fatanin er av Danmark?
Grønland
23%
32%
28%
10%
Føroyar
8%
36%
36%
6%
13%
Hvussu heldur tú danskir fjølmiðlarnir mynda landið?
Grønland
4%
19%
38%
22%
13%
Føroyar
8%
32%
39%
4%
16%
Hvat er tín almenna fatan av landi?
Grønland
11%
37%
34%
9%
8%
Føroyar
14%
40%
31%
11%
N=222
FØROYSK UNG
Hvat heldur tú almanna fatanin er av Føroyum?
Danmark
19%
45%
22%
7%
Grønland
8%
44%
22%
7%
14%
6%
Hvussu heldur tú føroyskir fjølmiðlarnir mynda landið
Danmark
16%
41%
27%
6%
8%
Grønland
14%
34%
12%
19%
19%
Hvat er tín almenna fatan av landi?
Danmark
8%
50%
23%
9%
8%
Grønland
15%
32%
17%
30%
6%
N=318
GRØNLENDSK UNG
Hvat heldur tú almanna fatanin er av Grønlandi?
Danmark
11%
26%
35%
8%
4%
15%
Føroyar
13%
25%
15%
44%
Hvussu heldur tú grønlendskir fjølmiðlarnir mynda landið?
Danmark
6%
15%
43%
8%
5%
23%
Føroyar
7%
15%
22%
4%
1%
51%
Hvat er tín almenna fatan av landi?
Danmark
4%
11%
44%
14%
6%
20%
Føroyar
4%
18%
24%
49%
Ógvuliga jalig
Jalig
Hvørgan jalig ella neilig
Neilig
Ógvuliga neilig
Eg veit ikki

# FELAGSKENSLA

***Í hesum partinum kanna vit nærri, hvussu felagskenslan kennist av teimum ungu í ríkisfelagsskapinum, og um tey kenna seg við mentanina hjá hinum báðum londunum.***

Tað er ymiskt, hvussu felagskenslan kennist av teimum ungu í ríkisfelagsskapinum, og um tey kenna seg við mentanina hjá hinum londunum.

Meirilutin av donskum ungum hava ikki eina felagskenslu við ung í Grønlandi og Føroyum (ávikavist 71 % og 66 %), og kenna seg heldur ikki við mentanina í báðum londunum (67 % og 61 %). Hinvegin halda 61 % av ungum danum, at felagskenslan hevði voksið, um tey høvdu ein størri kunnleika um Grønland og Føroyar (21 % siga nei, 18 % vita ikki).

Føroysk ung kenna týðiliga ein størri felagsskap og eitt størri tilknýti til donsk og grønlendsk ung, men tey eru eisini ivasom um spurningin. Ein meiriluti kenna í onkran ella størri mun ein felagsskap við ungum úr Grønlandi (62 %) og Danmark (56 %). 58 % og 60 % kunnu í onkran ella størri mun seta seg í samband við donsku ella grønlendsku mentanina. Hóast ivasemið um spurningin, kenna tey ungu ein felagsskap og kunnu seta seg í samband við mentanina í hinum londunum.

Øðrvísi er í Grønlandi. Her eru Føroyar aftanfyri í øllum spurningunum. Ein meiriluti kenna ikki ein felagsskap við ungum føroyingum (21 %) og heili 49 % siga, at tey í minni mun ella als ikki kenna ein felagsskap. 30 % vita ikki. 47 % kenna í onkran ella størri mun ein felagsskap við ungum í danum, og 38 % í minni mun ella als ikki. Hinvegin kann ein størri meiriluti seta seg í samband við danskari mentan (67 %), meðan 21 % kenna seg við mentanina í Føroyum.

71 % grønlendsk og 68 % føroysk ung halda, at størri vitan kann elva til eina størri felagskenslu.

**"Eg haldi, at øll trý londini hava fordómar um hvønn annan, men eg haldi eisini, at har eru fleiri neiligar fordómar millum Danmark og Grønland, tí vit hava eitt tættari samband. Har búgva ikki nógvir føroyingar í Grønlandi. Vit síggja danir hvønn dag í skúlanum, á arbeiðsplássinum og okkara stjórar eru ofta danir"**

Grønlendsk kvinna, 24 ár.




DONSK UNG
í hvønn mun kennir tú ein felagsskap við ungum úr hinum báðum londunum?
Grønland 4% 17% 28% 43% 8%
Føroyar 6% 18% 27% 39% 8%
í hvønn mun kennir tú teg við mentanina hjá hinum londunum?
Grønland 4% 18% 32% 35% 10%
Føroyar 5% 19% 30% 31% 12%
FØROYSK UNG
í hvønn mun kennir tú ein felagsskap við ungum úr hinum báðum londunum?
Danmark 7% 25% 24% 29% 9% 5%
Grønland 13% 19% 30% 18% 8% 12%
í hvønn mun kennir tú teg við mentanina hjá hinum londunum?
Danmark 10% 28% 22% 20% 13% 7%
Grønland 9% 22% 27% 21% 8% 14%
GRØNLENDSK UNG
í hvønn mun kennir tú ein felagsskap við ungum úr hinum báðum londunum?
Danmark 9% 10% 31% 25% 13% 15%
Føroyar 8% 11% 18% 31% 30%
í hvønn mun kennir tú teg við mentanina hjá hinum londunum?
Danmark 12% 22% 33% 16% 12%
Føroyar 15% 25% 29% 25%
Í sera stóran mun
Í stóran mun
Eitt sindur
I minni mun
Slett ikki
Eg veit ikki

# HUGBURÐUR

***Í hesum partinum kanna vit nærri, um ung stuðla samstarvið millum teimum trimum londunum***

**“Eg haldi ikki, at vit í ævir skulu verða ein partur av ríkisfelagsskapinum. Eg havi einki argument fyri hetta, men eg føli, at vit einaferð skulu gerast sjálvstøðug”**

Grønlendsk kvinna, 19 ár.



Meginparturin av ungum í ríkisfelagsskapinum ynskja at varðveita ella styrkja samstarvið millum Føroyar, Grønland og Danmark. Hetta er, hóast føroysk og grønlendsk ung ikki einans síggja fyrimunir í samstarvinum. Samstundis halda nógv ung, at ríkisfelagsskapurin hevur tørv á eina dagføring.

**Hugburður um eitt framtíðar samstarv**
Í Danmark ynskja 52 % ung at styrkja samstarvið millum londini, meðan 19 % halda, at núverandi samstarvið er nøktandi. Sostatt taka 71 % undir við samstarvinum, sum tað er í dag ella eina dagførda útgávu. 11 % ynskja at taka seg úr samstarvinum (á 1-4 stiganum), meðan 18 % ikki hava tikið støðu til spurningin. Einans 3 % eru á á talvuni høgru megin 1-2.

Í Føroyum ynskja 51 % í størri ella minni mun at styrkja samstarvið millum londnini. 41 % ynskja at styrkja tað, og 12 % halda, at núverandi samstarvið er nøktandi. Tilsamans ynskja heili 63 % at varðveita ella styrkja samstarvið. 31 % vilja í minni ella størri mun enda samstarvið (á 1-4 stiganum). Sostatt vísa úrslitini eina ósemju millum føroysk ung um samstarvsspurningin, hóast ein greiður meiriluti ynskja at varðveita ella at styrkja samstarvið.

Tað sama er í stóran mun galdandi millum grønlendsk ung, har 52 % ynskja at styrkja samstarvið, meðan 12 % eru nøgd við núverandi støðuni. Samlað ynskja 64 % at varðveita ella styrkja samstarvið millum londini. Heili 28 % vísa í størsta mun, at samstarvið skal styrkjast. Hinvegin ynskja 13 % í minni ella størri mun at enda tað. Hóast undirtøka er fyri at varðveita ella styrkja samstarvið, so er eisini mundandi mótstøða.

Í viðtalukanningini eru tey ungu í øllum trimum londum í iva um, hvat tey halda um ríkisfelagsskapin. Tey síggja bæði fyrimunir og vansar. Samstundis er trupult hjá teimum at síggja avleiðingarnar av, at geva londunum størri sjálvræði ella við at enda samstarvið. Tey donsku ungu eru í iva um, hvat tey skulu halda. Summi siga, at ivasemið er grundað á, at tey mangla vitan um virksemið hjá ríkisfelagsskapinum. Millum føroysk og grønlendsk ung halda summi, at londini burdu verið sjálvstøðug. Onnur halda, at londini skulu arbeiða eftir at gerast sjálvstøðug í framtíðini. Tey ungu eru kortini í iva av fleiri orsøkum.


DONSK UNG
Hvat halda tit um framtíðina hjá ríkisfelagsskapinum?
18%
11%
4%
14%
15%
8%
19%
4%
4%
1%
2%
FØROYSK UNG
Hvat halda tit um framtíðina hjá ríkisfelagsskapinum?
7%
14%
2%
15%
10%
10%
12%
7%
12%
5%
7%
GRØNLENDSK UNG
Hvat halda tit um framtíðina hjá ríkisfelagsskapinum?
13%
28%
3%
10%
6%
5%
12%
3%
5%
2%
13%
1
2
3
4
5
6
7
8
9
10
Samstarvið skal enda
Samstarvið skal varðveitast
Samstarvið skal styrkjast
Eg veit ikki

**Er samstarvið vorðið javnari?**
Ung úr øllum trimum londum halda ikki, at samstarvið er vorðið javnari fimm tey seinastu árini. Nógv siga seg ikki vita. Millum donsk ung halda 36 %, at tað í ávisan ella størri mun er vorðið meira javnstøðugt, meðan 39 % ikki vita. Tað sama siga tey í Grønlandi (ávikavist 25 % og 35 %). Í Føroyum siga 20 % ung, at samstarvið er vorðið meira javnstøðugt í onkran ella størri mun, meðan heili 44 % siga "í lítlan mun". 24 % vita ikki.

Á hendan hátt eru ung í øllum trimum londum lutfalsliga samd um, at samstarvið ikki er vorðið javnari, og tey høgu tølini í bólkinum "veit ikki" vísa, at tey ungu ikki kenna seg nóg útgjørdan til at svara spurningin.

**Ríkisfelagsskapurin treingir til eina dagføring**
Í spurnarblaðakanningini verða tey ungu spurd, hvussu tey, við einum orðið, vildu lýst ríkisfelagsskapin. Her siga 47 % ung úr Danmark, at tað er týdningarmikið at varðveita felagsskapin millum tey trý londini, og 25 % siga, at hann hevur tørv á eina dagføring. Millum grønlendsk ung eru samsvarandi tølini 17 % og 33 %, og millum føroysk ung eru tey 39 % og 41 %. Bólkurin "tørv á eina dagføring" er størsti vinnarin millum føroysk og grønlendsk ung, og er eisini á hægri stiganum í Danmark. Samanumtikið vísir hetta, at ein størri meiriluti heldur, at ríkisfelagsskapurin hevur tørv á einari dagføring.

Les nærri um, hvat tey ungu halda um ríkisfelagsskapin í fullu frágreiðingini gjøgnum QR-kotuna.





# UPPSKOT TIL EINA LOYSN FRÁ TEIMUM UNGU

***Tey ungu hava fleiri uppskot til, hvussu vit skapa sterkari bond og skilnað.***

**Meira undirvísing**
Tey ungu halda, at besti mátin at økja kunnleikan er at hava meira undirvísing um ríkisfelagsskapin í skúlanum. Nærum 90 % av donskum ungum ynskja, í ein ávísan mun, meira vitan um ríksifelagsskapin og hini bæði londini. Í Grønlandi ynskja tey ungu eisini at læra meira um Føroyar og Danmark í skúlanum. Her sóknast helst eftir undirvísing um Føroyar. Ung í Føroyum ynskja eisini at læra meira um hini bæði londini í skúlanum, helst um Gønland.

Har er sostatt stórur áhugi frá øllum trimum londum at læra meira um ríkisfelagsskapin og hini bæði londini. Her vísa tey ungu á skúlan sum sjálvsagda staðið at byrja.

**Fundarstøð í øllum trimum londum**
Í øllum trimum londum halda tey ungu, tað er umráðandi, at tey kunnu savnast og læra frá hvørjum øðrum og um hvønn annan. Her eru uppskotini m.a. at skúlarnir skipa fyri námsferðir og gera tað møguligt hjá felagsskapum at halda fundir í teimum trimum londunum.

**Betri umtalu í fjølmiðlunum**
Fjølmiðlarnar hava stóra ávirkan á, hvussu vit skilja hvønn annan. Tí halda tey ungu, at tað er neyðugt, at fjølmiðlarnir skriva fleiri jaligar søgur um hini bæði londini. Tørvur er á at breiða út nýggja vitan um Føroyar og Grønland sum nútímans samfeløg.

Ungdómurin heldur eisini, at er ov lætt at gera skeivar ella ótíðarhóskandi niðurstøður og lata fordómarnar vinna, um vit ikki kenna hvønn annan.

**Upplýsingararbeiði og brúkarar á sosialum miðlum**
Luttakararnir í viðtalukanningini leggja upp til at gera filmsátøk, forklárandi video og brúkarar á sosialum miðlum, har tey ungu kunnu samskifta og læra um hvønn annan. Á hendan hátt fáa tey ungu størri innlit í ungdómslívið og læra um hini bæði londini.

# SOLEIÐIS HAVA VIT ARBEITT

***Málbólkur: 18-28 ár***
***Kanningin er sett saman av eini spurnarblaða- og viðtalukanning.***

**Spurnarblaðakanningin**
Til tess at avdúka kunnleikan, áhugan og hugburðin hjá teimum ungu um ríksifelagsskapin, Føroyar, Grønland og Danmark, eru talgild spurnarbløð send til tey trý londini.. Epinion hevur staðið fyri at senda tað til eitt úrtak av donskum ungum.

Til tess at savna inn svar frá grønlendskum og føroyskum ungun, hevur DUF – Dansk Ungdoms Fællesråd arbeitt við samstarvsfelagar úr báðum londunum, sum hava sent spurnarblaðið til skúlar, sosialar miðlar og felagsskapir. Spurnarblaðið er týtt úr donskum til grønlendsk og føroysk. Grønlendska spurnarblaðið var bæði á donskum og grønlendskum.

Tilsamans svaraðu 1014 donsk, 318 grønlendsk og 222 føroysk ung í aldrinum 18-28 ár kanningina.

**Viðtalukanningar**
Fyri at fáa eina djypri fatan av kunnleikan, áhugan og hugburðin hjá teimum ungu um ríkisfelagsskapin og hini londini, hava vit sett tríggir fokusbólkar í verk – ein fyri hvørt land. Tá vit leitaðu eftir luttakarum løgdu vit dent á, at finna eina samanseting av ungum, sum vóru ymisk í aldri, bústaði og kyn. Tá samrøðan varð gjørd, búðu allir luttakarar í landinum, teir umboðaðu.



# UM SJÓMAQ

**Vit eru ymisk, men hava nógv í felag**
Sjómaq-verkætlanin hevur til endamál at styrkja sambandið millum ung í ríkisfelagsskapinum. Hetta ger verkætlanin við at gera tað møguligt hjá ungum at møta øðrum ungum úr hinum londunum í ríkisfelagsskapinum, við støði í tí, sum er týdningarmikið fyri tey.

Verkætlanin er eitt samstarv millum ungmannafeløg í Føroyum, Grønlandi og Danmark. Við útgangsstøðið í virðir, sum t.d. virðing sínamillum, forvitni, javnvirðið og opinleika, arbeiðir verkætlanin fyri at skapa ein sterkari felagsskap millum landamørk.

Tað skal vera pláss fyri ymiskleika, men tað kann eisini vera við til at fjala fyri, at ungdómslívið í ríkisfelagsskapinum, á mongum økjum, líkist hvørjum øðrum. Tí er stýrisbólkurin í verkætlanini komin fram til mottoið: *"Vit eru ymisk, men hava nógv í felag."*

Les nærri um Sjómaq-verkætlanina á **www.sjomaq.org**




SJÓMAQ